ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

INNANHÝSIS

**Løgtingið**

6. mars 2015
Mál: 15/00098-3
Viðgjørt: Jónas Tór Næs

**Løgtingsmál nr. Xx/2015: Uppskot til broyting í løgtingslóg um almenna forsorg**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg**
**(ásetingar um endurvenjing)**

**§ 1**

Í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. mars 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 129 frá 19. desember 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Aftaná § 28 verður sett:
“**§ 29.** Almannaverkið veitir endurvenjing til borgarar í arbeiðsførum aldri, sum hava tørv á endurvenjing í sambandi við mistan førleika. Endamálið er, at borgarar fáa neyðuga endurvenjing,
   1. fyri at fáa ella fasthalda tilknýti til arbeiðsmarknaðin ella
   2. fyri at klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

*Stk. 2.* Fyri at røkja sína skyldu sbrt. stk. 1 kann Almannaverkið gera avtalur við aðrar myndugleikar, stovnar og privatar veitarar um keyp av tænastum.
*Stk.* 3. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur og treytir um endurvenjing innan Almannaverkið, um endurvenjingarætlanir og um gjald millum myndugleikar.

2) Sum yvirskrift yvir § 29 verður sett:
“*Endurvenjing*”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. september 2015.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### Orsøkir til lógaruppskotið
Grundstøðið undir sosialum arbeiði er at menna og stuðla borgaranum til sjálvbjargni. Tað er tó eingin lóggáva í Føroyum, sum tryggjar borgarum lógarfestan rætt til endurvenjing. Hetta merkir, at eingin trygd er fyri, at borgarar, ið hava mist einhvørjan førleika og tískil hava tørv á endurvenjing, fáa neyðugu endurvenjingina.

Við hesi lógarbroyting fáa borgarar í arbeiðsførum aldri, sum hava tørv á endurvenjing í sambandi við mistar førleikar, ein lógartryggjaðan rætt til endurvenjing innan almannaøkið.

### Verandi skipan
Endurvenjingin í Almannaverkinum er í løtuni undir uppbygging. Ætlanin er, at endurvenjing skal verða ein landsfevnandi tænasta, men í løtuni er hon skipað í tveimum eindum. Ein er í Runavík, sum hevur málsøkið Norðoyggjar og Eysturoy og ein er í Tórshavn, sum fevnir um Suðurstreym. Hesar báðar eindirnar skulu víðkast, soleiðis at tær kunnu náa borgarum úr øllum landinum.

Endurvenjing í Almannaverkinum leggur dent á at menna og stuðla borgarum til størri sjálvbjargni og við tí størri sjálvsavgerðarrætt. Endamálið er, at borgarin við endurvenjingini heilt ella partvíst endurvinnur sama førleika aftur, sum viðkomandi hevði áðrenn førleikin var mistur.

Endurvenjingin skal hjálpa borgarum aftur á arbeiðsmarknaðin ella at gerast meiri sjálvstøðug og virkin í heima- og frítíðarlívi. Málbólkurin hjá Almannaverkinum í samband við endurvenjing eru:

- Borgarar, sum hava trupulleikar við at fáa ella fasthalda sítt tilknýti til arbeiðsmarknaðin ella
- Borgarar sum fáa, ella hava rætt til tilboð frá Trivnaðardeplinum og verða mett at kunna venjast til størri sjálvbjargni.

Harafturat er tað ein treyt, at borgarin skal verða í arbeiðsførum aldri og hava verið úti fyri tilburði, sum hevur broytt førleikastøðið og lívsumstøðurnar munandi. Endurvenjing verður einans játtað í eitt avmarkað og frammanundan avtalað tíðarskeið.

Tann 1. januar 2015 varð heimatænasta, eldrarøkt v.m. lagt til kommunur at umsita. Í hesum sambandi varð tann parturin av endurvenjingini, sum hoyrir til økisterapiina, eisini lagdur til kommunurnar at umsita. Málbólkurin hjá økisterapeutum eru heimabúgvandi fólkapensjónistar og borgarar í heimatænastuni annars. Endurvenjing til henda málbólk verður ikki nærri viðgjørt í hesum lógaruppskotið.

### Endamálið við uppskotinum
Við hesum lógaruppskoti er ætlanin at áleggja Almannaverkinum skyldu til at veita borgarum í arbeiðsførum aldri endurvenjing, tá ið teir hava tørv á endurvenjing fyri at venja aftur ein ella fleiri mistar førleikar. Ætlanin er sostatt, at stuðla undir ætlanunum hjá Almannaverkinum um at skipa endurvenjingartilboð og at byggja víðari uppá arbeiðið, sum Almannaverkið hevur sett í verk viðvíkjandi endurvenjing.
Í lógaruppskotinum verður endurvenjing fatað sum tað, at venja aftur mistar førleikar og/ella geva honum amboð til at stuðla undir mistan førleika, soleiðis at borgarin verður førur fyri at

koma aftur í arbeiði ella at borgarin klárar seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Endurvenjing í hesum lógaruppskotinum fevnir ikki fyribyrgjandi venjing og viðlíkahaldsvenjing.

Ofta verður endurmenning fatað sum tað sama sum endurvenjing. Hetta er tó ikki rætt. Endurmenning fevnir um øll lívsins viðurskifti, tvs. umframt viðgerð, endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing eisini fíggjarviðurskifti, útbúgving, arbeiðstilboð, bústaðartilboð og sosialu støðuna sum heild.

Eingin serstøk heimild er til at veita endurvenjing innan almannaøkið í dag. Tørvurin á endurvenjing er sera fjølbroyttur og eru tað ymiskir fakbólkar, sum veita endurvenjing og tískil samstarva um at veita endurvenjing frá ymiskum sjónarhornum. Endurvenjing kann eitt nú vera neyðug eftir lokna viðgerð á sjúkrahúsi í sambandi við skurð, sjúku ella vanlukku ella eftir langa sjúkralegu, har førleikin er tarnaður. Heilsumálaráðið er í eini tilgongd at tryggja borgarum lógarfestan rætt til endurvenjing innan sjúkrahúsverkið og í tí sambandi er tað umráðandi, at eitt tvørfakligt samstarv fer fram millum viðkomandi fakbólkar innan sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur. Ætlanin er, at markamóti millum Heilsuverk og Almannaverk verður nærri lýst í kunngerð við heimild í § 29, stk. 3.

Av tí at hetta lógaruppskotið bert fevnir um endurvenjingaruppgávur hjá Almannaverkinum, verða endurvenjingaruppgávurnar hjá sjúkrahúsverkinum og kommununum ikki lýstar í hesum sambandi.

**Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Sambært lógaruppskotinum verður rætturin til endurvenjing innan Almannaverkið staðfestur. Almannaverkið skal sostatt veita endurvenjing til borgarar í arbeiðsførum aldri, sum hava tørv á endurvenjing í sambandi við mistar førleikar.

Við lógaruppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta nærri reglur og treytir um endurvenjing innan Almannaverkið, um endurvenjingarætlanir og um gjøld.

Almannaverkið hevur ikki áður havt sjálvstøðuga heimild til at veita fólki endurvenjing, og mett verður, at endurvenjing innan almannaøkið við hesum verður ein meira sjónligur partur av virkseminum hjá Almannaverkinum.

**Ummæli**
Løgtingslógaruppskotið verður sent til ummælis hjá: Almannaverkinum, Ergoterapeutfelagnum, Fysioterapeutfelag Føroya, Heilsuhjálparafelag Føroya, Heilsurøktarafelagnum, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktafrøðingar, Krabbameinsfelagnum, Landsfelag Pensjónista, Landslæknanum, MBF, Sjúklingaráðnum, Heilsumálaráðnum, Kommunufelagnum, Læknafelagnum Føroya Pedagogfelag, Føroyskir sálarfrøðingar og undirliggjandi stovnum.

## Kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Í fíggjarlógini fyri 2015 eru uml. 4 mió. kr. játtaðar til endurmenning. Endurmenning umfatar øll lívsins viðurskifti, tvs. umframt viðgerð, endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing eisini fíggjarviðurskifti, útbúgving, arbeiðstilboð, bústaðartilboð og sosialu støðuna sum heild. Av hesum uml. 4 mió. kr. verða umleið helvtin av játtanini brúktar til endurvenjing.

Væntast má, at lógarbroytingin fer at hava ein bruttokostnað við sær, men hinvegin er ikki vist, at samlaði nettokostnaðurin fyri lands- ella samfelagsbúskapin verður nevniverdur. Um fólk í minni mun missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin vegna førleikamiss, um tilgongdin av fyritíðarpensjónistum av tí sama minkar, og um miðaltyngdin á røktarsjúklingum minkar, orsakað av munabetri endurvenjing, so vigar hetta uppímóti tí meirorku, sum skal setast av, til tess at náa endamálinum við lógarbroytingini.

Tá ið metast skal um fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum, skal tað viðmerkjast, at enn eru fleiri óvissur um markamót og samstarvsavtalur eins og torført er at gera neyvar metingar um vavið á virkseminum næstu árini. Tað er enn ikki námgreinað hvar markamóti mótvegis sjúkrahúsendurvenjingini fer at vera, og hevur hetta stóran týdning fyri, nær rætturin til endurvenjing frá sjúkrahúsverkinum endar og nær Almannaverkið tekur við.

Almannaverkið hevur mett, at um støði verður tikið í at verandi endurvenjingar tænasta hjá Almannaverkinum verður víðkað til at fevna um alt landið, verður tørvur á umleið 560 tús. kr. fyri 2015 og 1.675 tús kr. fyri 2016 afturat verandi játtan. Harafturat verður neyðugt við 1.000 tús. kr. til verksetan í 2015/2016. Sum nevnt er kostnaðarmetingin grundað á verandi virksemi hjá Almannaverkinum, og stór óvissa er tengd at metingini, grundað á at øki er undir uppbygging, og at Almannaverkið væntar økta tilgongd næstu árini vegna eitt nú økt fokus og størri kunnleika til tænastuna. Hesum er hædd ikki tikin fyri og tí kann verða neyðugt við hægri játtan næstu árini.

Samanumtikið er tað ógvuliga trupult at siga, hvat lógarbroytingin fer at hava við sær av øktum útreðslum fyri landið, tí tað eru so nógv viðurskifti, meira og minni kend og mátalig, sum gera seg galdandi. Tað er tó væntandi, at lógarbroytingin hevur við sær tørv á øktari játtan til endurvenjing innan endurmenningina. Við at gera íløgur í endurvenjing, kunnu útreiðslurnar aðrastaðni í samfelagnum minka.

**Umsitingarligar avleiðingar**
Lógarbroytingin hevur umsitingarligar avleiðingar fyri Almannaverkið, ið umsitir endurvenjingina, við tað at borgarar í arbeiðsførum aldri, sum í sambandi við mistan førleika hava tørv á endurvenjing, fáa lógartryggjaðan rætt til endurvenjing, soleiðis at hesir borgarar fáa ella fasthalda tilknýti til arbeiðsmarknaðin ella klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum. Av tí at rætturin til endurvenjing verður lógartryggjaðir, verður neyðugt við munandi størri málsviðgerð.

**Umhvørvisligar avleiðingar**
Lógarbroytingin hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Lógarbroytingin hevur ikki avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**Sosialar avleiðingar**
Lógarbroytingin hevur við sær jaligar sosialar avleiðingar fyri borgarar í arbeiðsførum aldri, av tí at hesir borgarar við hesum fáa rætt til endurvenjing innan almannaøkið.

**Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | ////////////////////////////////////////////////// | | Nei | Ja | ////////////////////// |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

Til § 1, nr. 1)

Í § 29, stk. 1 verður rætturin til endurvenjing innan almannaøkið staðfestur. Sambært ásetingini veitir Almannaverkið endurvenjing til borgarar í arbeiðsførum aldri, sum hava tørv á endurvenjing í sambandi við mistar førleikar. Í høvuðsheitum eru tað fólk í aldrinum 18 til og við 66 ár, sum eru fevnd av hesi áseting, men í ávísum førum kann vera skilagott at veita ungum fólkum frá umleið 16 ár við mistum førleika endurvenjing sum liður í einari arbeiðsbúgving. Endurvenjingin hevur til endamáls, at borgarin heilt ella partvíst endurvinnur sama førleika, sum áðrenn førleikin var mistur.

Málbólkurin fyri endurvenjing sambært hesum lógaruppskoti eru borgarar, sum hava mist einhvørjan førleika, og hava tørv á endurvenjing fyri at fáá ella fasthalda tilknýti til arbeiðsmarknaðin ella fyri at klára seg uttan ella við minni hjálp frá Almannaverkinum. Í endurvenjingini er neyðugt við samstarvi millum borgaran við førleikatarni, avvarðandi og heilsustarvsfólk.

Endurvenjingin skal vera miðvís, tíðaravmarkað og samskipað. Miðvíst merkir, at tann einstaki sjálvur eigur at kunna seta sær málini fyri sína endurvenjing í samráð við heilsustarvsfólk. Tíðaravmarkað merkir, at tað kann mátast, nær málið fyri endurvenjingini er rokkið. Samskipað merkir, at stovnar og heilsustarvsfólk mugu draga somu línu, so borgarar kunnu náa síni mál við endurvenjingini skjótast gjørligt og aftur at liva eitt virkið lív.

Í § 29, stk. 2 verður ásett, at Almannaverkið kann, fyri at røkja sína skyldu sambært stk. 1, gera avtalur við aðrar myndugleikar, stovnar og privatar veitarar. Ætlanin við hesum er, at gera eina liðiliga skipan, har møguleiki verður at keypa tænastur fra øðrum myndugleikum, stovnum og privatum veitarum tá ið mett verður, at tað er mest skynsama loysnin. Sum dømi

kann nevnast, at um eitt sjúkrahús ella kommunalt samstarv/kommuna o.a. hava serligar hentleikar til endurvenjing og hesir hentleikar ikki finnast innan Almannaverkið, er møguleiki at gera avtalur soleiðis at viðkomandi stovnur, myndugleiki ella privati veitari veitir tænastuna mótvegis einum gjaldi frá Almannaverkinum.

§ 29, stk. 3 heimilar landsstýrismanninum at tilevna nærri reglur og treytir um endurvenjing innan Almannaverkið, um endurvenjingarætlanir og um gjald.

Í tilmæli frá arbeiðsbólki í.s.v. markamót millum land og kommunur, tá ið heimatænasta, eldrarøkt v.m. varð løgd til kommunur at umsita, varð mælt til, at Almannaverkið frá 1. januar 2015 skuldi veita endurvenjing til borgarar í arbeiðsførum aldri og sum eru fevndir av hesum:

1. Persónar, sum:
    a. ikki eru komin á arbeiðsmarknaðin ella ikki hava fóta sær á arbeiðsmarknaðinum
    b. eru í vanda fyri at missa, ella hava mist, tilknýti til arbeiðsmarknaðin.
2. Persónar sum fáa, ella hava rætt til, tilboð frá Trivnaðardeplinum og verða mett at kunna venjast til størri sjálvbjargni.
3. Persónar hvørs lívsstøða krevur umfatandi endurmenning, har endurvenjing er ein partur av endurmenningini.

Felags fyri hesar tríggjar bólkar er, at persónurin skal hava verið úti fyri hending ella tilburði, sum hevur broytt virkisførleikan munandi og harvið eisini broytt lívsstøðuna og lívsumstøðurnar hjá viðkomandi munandi.
Undantak frá hesum er tó teir borgarar í bólki 1, sum ongantíð hava fingið fótafestið á arbeiðsmarknaðinum. Her er tað ikki eitt krav, at borgarin skal hava verið fyri ávísari hending ella tilburði, fyri at fáa endurvenjing.

Lagt verður upp til, at útgangsstøði verður tikið í tilmælinum frá arbeiðsbólkinum, tá ið reglur og treytir, sambært § 29, stk. 3 skulu ásetast.

Fyri at endurvenjingin skal vera miðvís, er tað neyðugt, at fólk við førleikatarni hava eina endurvenjingarætlan. Ein endurvenjingarætlan hevur sum endamál at lýsa fýra tættir: Førleikan áðrenn førleikatarnið, lýsing av førleikatarninum, verandi førleika og mál fyri endurvenjingini. Vísast skal til hvar endurvenjingin skal veitast og hvussu langt tíðarskeið endurvenjingin verður mett at vara. Tað er umráðandi, at Almannaverkið tekur støði í tí endurvenjingarætlan, sum verður veitt av sjúkrahúsinum, tá ið borgarar verða útskrivaðir av sjúkrahúsunum við eini endurvenjingarætlan. Hetta fyri at borgarar ikki detta niðurímillum skipanirnar. Hvar sjúkrahúsið sleppur og Almannaverkið tekur við verður nærri ásett í kunngerð, sambært § 29, stk. 3, og verður hetta gjørt í samráð við Heilsumálaráðið.

Ásetingar í hesi lóg eru bert galdandi fyri ta endurvenjing, ið fer fram í Almannaverkinum, og hevur tí ikki ávirkan á ta endurvenjing, ið fer fram í sjúkrahúsinum ella í kommununum. Í kunngerðararbeiðinum er tað tó umráðandi, at samstarva við kommunur og Heilsumálaráðið fyri at tryggja, at borgarar ikki detta niðurímillum skipanirnar og tryggja, at borgarin fær eina samskipaða og skynsama endurvenjing tvørtur um stovnar og sostatt gera tað greitt hvørja endurvenjing ávikavist kommunur, Almannaverkið og Heilsuverkið veita borgarum.

Sambært § 29, stk. 3 hevur landsstýrismaðurin heimild at tilevna nærri reglur og treytir um gjald millum myndugleikar. Ein kann ímynda sær, at ávikavist Heilsuverkið,

kommunur/kommunal samstørv og Almannaverkið koma at samstarva um endurvenjing við at leiga hølir og tænastur o.t. hvør frá øðrum. Í hesum sambandi fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta nærri treytir um gjald hesum viðvíkjandi.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting. Skotið verður upp, at lógarbroytingin fær gildi frá 1. september 2015, soleiðis at landsstýrismaðurin fær stundir at tilevna kunngerðir og aðrar reglur viðvíkjandi endurvenjing, og soleiðis at Almannaverkið fær tíð til at fyrireika broytingina.